# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Rættartrygdin í FSF

Málið um spæliloyvið hjá Magnusi Olsen er feskasta dømið um teir trupulleikar, sum føroyskur fótbóltur hevur rent seg í, síðani felagsskapurin í fjør tók at kalla loysing frá ÍSF.

Altjóða krøvini vóru, at fótbólturin skal vera evsti myndugleiki í øllum fótbóltsviðurskiftum, og í so máta kundi FSF illa gera annað, skuldi altjóða limaskapurin varveitast.

Nýggi valdsbygnaðurin hevur tó fleiri ferðir víst sína óhepnu síðu hetta seinasta hálva annað árið, har viðgerðir av fleiri einstøkum málum hava skapt nýggj fordømi til framtíðar tulkingar.

Ikki minst tykist tað her sera óheppið, at møguleikarnir hjá feløgunum at kæra til hægsat myndugleika nú eru avmarkaðir. Enntá somikið avmarkaðir, at somu nevndir, sum viðgera kærurnar, mest sum einsamallar kunnu gera av, um hesar kunnu kærast. Hetta tí revsingin skal hava eina ávísa støðd, áðrenn mál kunnu kærast.

Og júst hetta er nakað, sum tykist hava skapt størsta ótryggleikan í skipanini. Hóast Aganevndarúrskurðirnir hava verið fleiri – og hóast fleiri av hesum hava brotið við áður galdandi rættastøðu, so er bert eitt av hesum málum endað hjá yvirkærunevndini. Í tí serstaka førinum varð avgerðin hjá Aganevndini ógildað, og so kunnu fólk hava sín illgruna um, at nevndin eftir hetta við vilja hevur hildið avgerðunum á slíkum støði, at hesar ikki kunnu kærast.

Ítøkiliga er úrslitið, at nýggj fordømi í ávísum førum eru skapt innan lógartulkingina. Er talan um nýggja siðvenju, so er tað enn meira óheppið, at tulkingin av hesum ikki sleppur at standa sína roynd á hægsta stað. Ikki minst, tá talan er um mál, sum hava stóran prinsipiellan týdning.

**Sosialurin**

## Til Árna Dahl

**KÁRI DAVIDSEN**



Eg las grein tína "Tjóð á vegamóti" í Dimmu t. 22.05.08, og eg eri als ikki samdur við teg um tað, sum tú skrivar um orðabøkur, har tú m.a. skrivar, at "Onnur orðabókahandrit liggja klár til útgávu, men fáast ikki út, tí játtan vantar".

Orsøkin, at onnnur orðabókahandrit liggja klár til útgávu og ikki koma út, er ikki bert vantandi játtan. Nei, orsøkin er at finna í Orðabókagrunninum og Mentamálaráðnum sjálvum, tí har sita fólk, sum ikki megna at stýra nøkrum orðabókasmiðum, sum ikki kláraðu at fáa handritini liðug, men nú royna somu stovnar við øllum snildum at leingja teirra handrit. Játtanin er einki at hóreigja sær av, tað kunnu vit báðir vera samdir um.

Nei, tí er tað alneyðugt, at tær játtanir, sum verða latnar av Løgtinginum, vera nýttar skynsamt av fólki við innliti í orðabókagerð, men tað eru eingir tílíkir serfrøðingar, sum hava eitt fremmandamál í teimum "tilmælisbólkum" ella "nevndum", sum taka sær av orðabókagerð. Ein Tøknifrøðilig og Føroysk-donsk orðabók – neyvan fyri einki undir Orðabókagrunninum - hava nú í meira enn 10 ár verið ávegis, men enn hevur eingin sæð nakað til tær. Frá 2000 hevur Føroysk-týsk orðabók fyri knappar 2. milljónir og ein Russisk-føroyskt orðabók frá 2001 fyri knappar 2. milljónir stuðlaðar av Mentamálaráðnum verið í umbúna, men framvegis eru tær ikki komnar út. Her eru latnar knappar 4 milljónir, men til hvat?

So játtanin er ikki høvuðstrupulleikin, men tvørrandi fakligur førleiki og vantandi evni at stýra hesum verkætlanum eru ein eins stórur meinbogi.

Hyggið at avrikunum hjá Stiðjanum og Sprotanum: 1992 kom Ensk-føroysk orðabók, 1998 Donsk-føroysk orðabók og fyrst í 2005 kom tann talgilda Føroyskenska orðabókin út, og tær komu nú í 2008 í nýggjari útgávu. Og Samheitaorðabókin ikki at gloyma!

Teimum privatu er dugur og dygd í. Spegla tær í teimum! So halt uppat at mæla til, at Orðabókagrunnurin sum ein náttúrulóg skal hava øll orðabókahandrit – fyri einki, tí tað er kappingaravlagandi við lít fyri tey privatu, sum duga eins væl um ikki betur enn Orðabókagrunnurin.

## Á Sornfelli

Trøllkonufingur reisir seg upp um lág-sveimandi skýggini,
sum ein ófrættakendur og ræðandi boðberi úr dýpinum av myrkari tíð.
Trøllkonufingur er sum ein dularfullur og hóttandi minnisvarði úr fyrndini
- ein áminning um eina hvílandi, tó máttmikla, ónda og ræðandi megi.

Hinumegin fjørðin er mótpolur svikaligu Trøllkonufingurs:
Reystur og bulmikil situr tolni risin, Skælingsfjall,
sum ein kongur, ið skoðar yvir sítt fyrndargamla ríki.
Virðingarverdur situr risin herðabreiður og støðufastur
- ræðandi á einum ringum degi, men rættvísur -
og hevur altíð eitt vaki eyga í ein útsynning.

Skýggini gloypa um firðir og dalar, sum ein syndaflóð,
og umgyrða fjøllini sum brúsandi hav um sker.
Fjallatopparnir strekkja seg upp um hetta ullinta hav,
sum stoltir sigursharrar eftir drúgvan bardaga,
ið geva vón og áræði til tey fáu eftirstandandi,
sum skoða yvir henda stilla og rúnarbindandi vígvøll.

Sum her er vakurt! Stórsligið, bratt, grásvart og ræðandi;
lyng-brúnt, grønt, friðsælt og uggandi – alt í senn.

Angin av grasi og lyngi rennur saman
við tí reinu og sól-hitaðu fjallaluftini,
kitlar og kínir mínar sansir,
áðrenn hann fyllir míni lungu,
fyri síðani at fara yvir um markið
millum kropp og sál
- nertur við mítt sinn,
gleðir og nørir mína sál.

**Dávid Isfeld, 06.05.08, Sornfelli**

## Fuglafjarðar skúli

**JÓHAN HERI JOENSEN**

Í Eysturoynni uppdatera økini sínar skúlar, onkrar av bygdunum hava rivið niður gamlar ótíðarhóskandi bygningar og reist glæsiligar borgir ístaðin.

Bygt verður fyri 100 tals milliónir. Fleiri av skúlunum, sum nú verða uppdateraðir, eru ikki eldri enn frá seint í 70unum.

Til dømis kunnu nevnast skúlarnir á Eiði, Skála, Toftum og Runavík. Hesar kommunur hava tikið stór tøk á skúlaøkinum.

Strendur, Gøta og Leirvík hava sum fyrsta punkt á dagsskránni uppdatering av skúlaviðurskiftunum. Hesir skúlarnir eru eisini rímuliga nýggir allir samlir.

Í Fuglafirði hava vit eina fasta mannagongd.

Vit plaga at pjøssa upp á eitt gamalt ótíðarhóskandi umhvørvi.

Vit eru eisini serkøn í fyribylsloysnum.

Ein lítil verulig nýgerð er tó framd seinastu 50 árini, henda nýgerð kostaði uml. 14 milliónir.

Eiga vit ikki at drýpa høvur í skomm, heldur enn at reypa okkum av eini nýgerð upp á 14 mill. í 50 ár.

Nú verður enn einaferð stungið út í kortið.

Gamli skúli, sum skjótt verður 80 ára gamal, verður pjøssaður. Hettar gamla læsafarið skal enn einaferð verða atvoldin til, at verulig skúlabygging, verður útsett, og framtíðarætlanirnar sum stungnar vóru út í kortið skulu brúkast sum veggjapríði - prýtt við tómum lyftum.

Les meira á heimasíðuni www.fuglafjordur.com


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.